Broytingar

# Broytingar í flogleiðini

Frá 26. oktober koma broytingar á leið 300 og flogleiðini í gildi. Faldarar fáast í bussunum og á farstøðini.

## Flogleiðin

### Tórshavn - Flogvøllurin (300)

| Dag / Day | Tórshavn | Kollfjarðatunn. | Kollfjarðadalur | Sandavágur | Miðvágur | Vágar Airport | Sørvágur | Bøur |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| X | **06:50** | 07:10 | 07:15 | 07:25 | 07:30 | **07:45** | 07:50 | |
| ➢ X67 | **09:00** | 09:20 ◆ | 09:25 | 09:35 | 09:40 | **09:55** | 10:00 | |
| ✱ X67 | **09:30** | 09:50 | 09:55 | 10:05 | 10:10 | **10:25** | | |
| ➢✱ X67 | **12:00** | 12:20 | 12:25 | 12:35 | 12:40 | **12:55** | 13:00 | |
| ➢ X67 | **15:15** | 15:35 | 15:40 | 15:50 | 15:55 | **16:10** | 16:15 | |
| X | **16:15** | 16:35 | 16:40 | 16:50 | 16:55 | **17:10** | 17:15 | 17:25 |
| X67 | **17:15** | 17:35 | 17:40 | 17:50 | 17:55 | **18:10** | 18:15 | 18:25 * |
| X | **19:15** | 19:35 | 19:40 | 19:50 | 19:55 | **20:10** | 20:15 | |
| 67 | **20:00** | 20:20 | 20:25 | 20:35 | 20:40 | **20:55** | 21:00 | |

### Flogvøllurin - Tórshavn (300)

| Dag / Day | Bøur | Sørvágur | Vágar Airport | Miðvágur | Sandavágur | Kollfjarðadalur | Kollfjarðatunn. | Tórshavn |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| X | 6:30 | 6:40 | | 6:50 | 6:55 | 7:15 | 7:25 | **7:45** |
| X67 | | 7:50 | **7:55** | 8:00 | 8:05 | 8:25 | 8:30 | **8:50** |
| X | | 9:00 | **9:05** | 9:10 | 9:15 | 9:35 | 9:40 ◆ | **10:00** |
| ➢✱ X67 | | | **10:30** | | | 11:00 | 11:05 ◆ | **11:25** |
| ➢✱ X6 | | 13:10 | **13:30** | 13:35 | 13:40 | 14:00 | 14:05 ◆ | **14:25** |
| ✱ 7 | | 13:40 | **14:00** | 14:05 | 14:10 | 14:30 | 14:35 | **14:50** |
| X | | 16:05 | **16:10** | 16:15 | 16:20 | 16:35 | 16:40 | **17:05** |
| ➢ X67 | | | **16:50** | | | 17:20 | 17:25 ◆X7 | **17:45** |
| X | 18:00 | 18:10 | **18:15** | 18:20 | 18:25 | 18:45 | 18:50 | **19:10** |
| 67 | 18:40 | 18:50 | **18:55** | 19:00 | 19:05 | 19:25 | 19:30 | **19:50** |

➢✱ Hesar tíðir kunnu broytast munandi í sambandi við flogferðsluna.

➢ Í sambandi við Atlantic Airways / Atlantic Airways connection
✱ Í sambandi við Maersk Air / Maersk Air connection
◆ Í sambandi við leið 400 norðureftir / Connects with route 400 heading north
◇ Í sambandi við leið 400 vestureftir / Connects with route 400 heading west

* Einans dagarnir 6 og 7 / Only day 6 and 7
X Mánadag - Fríggjadag / Monday - Friday
6 Leygardag / Saturday
7 Sunnudag / Sunday

## Broytingar*

### Til Fuglafjarðar (400)

| Dag / Day | úr Tórshavn | úr Kollafirði | av Oyrarbakka | úr Skálabotni | úr Søldarfirði | í Leirvík | í Fuglafirði |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| X7 | 11:00 | 11:15 * | 11:40 * | 11:55 | 12:00 | 12:25 | 12:45 |
| X7 | 17:00 | 17:25 * | 17:45 * | 18:00 | 18:05 | 18:25 | 18:45 |

Báðir túrar hava samband við Flogleiðina.

### ◆ Til Vestmanna (100)

| Dag / Day | úr Tórshavn | Kollfjarðatunn. | Statoilstøðin | Kvívík | Vestmanna |
|---|---|---|---|---|---|
| X67 | 09:30 ◆ | 09:50 | 09:55 | 10:00 | 10:25 |
| X67 | 15:15 | 15:35 | 15:40 | 15:45 | 16:10 |

Farið verður við leið 300 úr Tórshavn og síðani við leið 100 frá Statoilstøðini.

### Til Eiðis (200) og Tjørnuvíkar (202)

| Dag / Day | Eiði/Tjørnuvík | á Oyrarbakka | av Oyrarbakka | Eiði/Tjørnuvík |
|---|---|---|---|---|
| X7 | 17:00 | 17:25 | 17:45 * | 18:20 |

Í sambandi við flogleiðina úr Vágum.

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo · 34 30 30

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3667
**Navn:** Sp/f 10. okt. 2003
**Hjánavn:** Sp/f Tór Marine (Sp/f 10. okt. 2003)
**Adressa:** Víkavegur 111, 700 Klaksvík.
**Kommuna:** Tórshavnar Kommuna
**Stovningardato:** 10.10.2003
**Viðtøkudato:** 10.10.2003
**Kapitalur:** Kr. 80.000,00
**Inngjaldingarháttur:** Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
**Stovnari:** Jancy Gunnarsson, Víkavegur 111, 700 Klaksvík.
**Stjórn:** Jancy Gunnarsson, Víkavegur 111 , 700 Klaksvík.
**Tekningarreglur:** Felagið verður bundið við undirskrift av einum stjóra.
**Grannskoðari:** Óli Hansen, Tróndargøta 39, 100 Tórshavn.
**Roknskaparár:** 01.01. - 31.12.
**Fyrsta roknskaparár:** 10.10.2003 - 31.12.2004
**Endamál:** Endamál felagsins er at reka fiskiskap umframt annað starv, sum hevur samband við hetta.

*Skráseting Føroya tann 23. oktober 2003*

*Kristin Balle*


Lýsið við brúktum bilum



Sosialurin
www.sosialurin.fo



Sosialurin
-tað loysir seg



Sosialurin hevur fingið nýggj nummur tel 341800 fax 341801




# Aðalfundur

## í Brúkarasamtakinum

**mikukvøldið 29. okt. kl. 19.30**

**hjá Starvsmannafelagnum**
**JH Schrøtersgøta 9, Tórshavn**

Skráin er sambært lógum felagsins:

- frágreiðing frá virki felagsins
- roknskapur
- val av nevndarlimum
- uppskot frá nevnd ella limum
- ymiskt

Vónandi møta allir limir felagsins, og nógv aftrat, sum kundu hugsað sær at verið limir - jú fleiri, jú sterkari.

**Brúkarasamtakið**

# Venjarar til Royn

Við hesum verður søkt eftir venjara til 2. deildarliðið hjá Royn næsta kappingarár. Vit hugsa fyrst og fremst um ein spælandi venjara, men tað er avgjørt ongin treyt.

Samstundis verður søkt eftir venjara til ungdómsliðini hjá felagnum.

Nærri fæst at vita á tlf. 228398 ella 222695.

**Royn**

# Rutuupplýsingin

Frá 1. november 2003 verða afturlatingar- og svartíðirnar á Rutuupplýsingini niðri á Farstøðini broyttar.

Rutuupplýsingin fer at hava opið frá:
**kl. 07.00 til kl. 20.00**
Farstøðin verður tó opin frá:
**kl. 07.00 til kl. 23.00**

STRANDFARASKIP LANDSINS

www.ssl.fo

# Skúlin fyri øll - hvussu fáa vit hann?

Javni, felagið hjá menningartarnaðum og familjum teirra, skipar fyri ráðstevnu í november í sambandi við, at 2003 er lýst at vera "Ár teirra brekaðu".

Ráðstevnan er fríggjakvøldið 14. november klokkan 18.45 við almennum og ókeypis fundi í samkomuhøllini á Studentaskúlanum á Kambsdali og á Sjómansskúlanum í Havn leygardagin 15. november frá klokkan 9 til 17.

Á ráðstevnuni eru fyrilesarar úr Norra, Íslandi og Føroyum. Øll serkøn skúlafólk, ið fara at lýsa støðu og royndir sínar á skúlaøkinum.

**Fríggjakvøldið 14. november** heldur Leif A. Fiskvik úr Norra fyrilestur undir heitinum "Skolen for alle - ideoligiske aspekter". Leif A. Fiskvik er pápi 34 ára gamla kvinnu við menningartarni og brekum. Hann er nevndarlimur í Norsk Forbund for Utviklingshemmede (NFU) og hevur sitið í alskyns nevndum hjá Undirvísingar- og granskingarmálaráðum. Er nú rektari á ungdómsskúla í Kristiansund í Norra. Eftir fyrilesturin er orðaskifti.

**Leygardagin 15. november** klokkan 9 bjóðar Sigrun Wardum, starvsnevndarlimur í Javna vælkomin á Sjómansskúlanum í Havn. Síðani er morgunmatur, og klokkan 9.30 setir Annita á Fríðríksmørk, mentamálaráðharri stevnuna.

Sangbólkurin Salt syngur klokkan 9.45.

Klokkan 10 **Støðan í skúlanum í dag**. Óli Wolles, næstformaður í Javna greiðir frá.

Klokkan 10.20 **Ítøkiligar ætlanir á sernámsfrøðiliga økinum**. Hans Eli Dahl, stjóri á Sernámsdeplinum fyrilesur.

Klokkan 11 spyr Leif A. Fiskvik úr Norra: **Hvad må til, for at det skal være mulig å skape en skole for alle?** Hann svarar sjálvur, eisini tá ið orðaskiftið er eftir fyrilesturin.

**Døgurði er á Læraraskúlanum klokkan 12. Kalt borð.**

Klokkan 13 fyrilesur Halldóra Haraldsdóttir úr Íslandi undir heitinum: **Vegurin frá serskúla til vanligan skúla. Hvussu loysa vit forðingarnar á vegnum?** Halldóra er cand.polit, lærari og serlærari, hevur verið rektari á serskúla og í fólkaskúla. Nú er hon lektari á lærara- og pedagogskúlanum á Akureyri. Aftaná er orðaskifti.

Klokkan 14 fer Annita á Fríðríksmørk á pallin og sigur frá **framtíðarætlanum í sambandi við at undirvísa børnum við serligum tørvi**. Síðani er orðaskifti.

Kaffi, te og skuffukaka klokkan 14.30.

Frá klokkan 14.45 til 16 skipar fundarfólkið seg í fimm bólkar, sum fara at røða um:

1. **Áðrenn barnið fer í skúla - fyrireikingar**
2. **Fyrru skúlaárini**
3. **Seinnu skúlaárini**
4. **Tey, ið ikki megna vanligan skúla**
5. **Samskipan: skúli, heim og frítíð**

Klokkan 16 hava bólkarnir framløgu, ið er støði undir orðaskifti og niðurstøðu.

Malena Arnholdsdóttir, formaður í Javna endar stevnuna, sum Hans Trygvi Teirin, advokatur hevur stýrt frá byrjan til enda.

Ráðstevnan er fyri øll áhugað, men vendir sær serliga til lærarar, serlærarar, pedagogar, lærara- og pedagognæmingar, terapeutar, heilsufrøðingar, psykologar, foreldur, avvarðandi og lands- og komunalpolitikarar.

Luttøkugjaldið er 300 krónur, matur íroknaður. Foreldur saman gjalda fyri ein.

**Tilmelding hjá Javna, telefon 314827 innan 7. november.**

Fyri ráðleggingarbólkin hjá Javna
Malena Arnholdsdóttir, formaður

JAVNI

Sosialurin 341800

# Hvalvíkar kvøldskúli

**Veturin 2003/2004**

Undirvíst verður í Handarbeiði í vetur **leygardag seinnapart.**

Luttøkugjaldið er 200 kr.

Tilmelding hjá læraranum: Paulinu Eliasen, tlf. 456614.

**Hvalvíkar kvøldskúli**


Sosialurin hevur fingið nýtt telefonnummar

tel 34 18 00
fax 34 18 01

heimasíða: www.sosialurin.fo
teldupostur: post@sosialurin.fo



Nýggjar TANNPROTESUR

Broytingar og umvælingar av gomlum protesum

Kliniskur tannteknikari
Bergur á Reynatrøð

Opið er:
mánadag-hósdag frá kl. 9-16
fríggjadag frá kl. 9-12

Børkuvegur
620 Runavík
Tlf. 448480